# Spæla móti Íslandi 16. mars

Fyrsti dysturin hjá fótbóltslandsliðnum í 2008 verður í Kópavági, har nýggj fótbóltshøll er gjørd. Talan er um ein vinardyst, ið verður spældur í spildurnýggju fótbóltshøllini Korinn í Kopavági. Dysturin móti Føroyum verður tann fyrsti A-landsdysturin hjá íslendingum, sum verður spældur innandura, og hetta verður sostatt eisini fyrsti landsdysturin, sum verður spældur í nýggju høllini í Kópavági. Við tað, at dysturin verður spældur ein dag, ið ikki er avsettur sum landsliðsdagur á kalendaranum hjá evropisku fótbóltssamgonguni UEFA, verður íslendska liðið helst mannað við leikarum, sum spæla heima í Íslandi.



# Arsenal spæla útsettan dyst

Mikukvøldið skulu Arsenal spæla sín dyst, ið hevur ligið á láni í longri tíð. Hesin dysturin er móti Newcastle á St. James Park. Dysturin skuldi upprunaliga verið spældur longu í øðrum umfari av Premier League, afturi í august mánað, men varð tá avlýstur. Eisini Liverpool og West Ham skuldu spæla tá, men hesin varð eisini avlýstur. Nær hesin dysturin verður spældur, er ikki greitt enn. Arsenal eru óhepnir hvat skaðum viðvíkur, men teir hava tó ein sera sterkan hóp. Spurningurin er bara, um Newcastle megnar at gera sær dælt av heasri støðuni.

## Manchester United gjørdu sína skyldu



Manchester United hevði í kvøld vitjan av London liðnum Fulham, og serliga Cristiano Ronaldo var í essinum um fyri United, ið vunnu tryggan sigur

Manchester United byrjaðu við sera offensivum spæli, og tað hildu teir áfram við, allan dystin á tamb.

Longu tá 10 minuttir vóru farnir av dystinum, kundi Cristiano Ronaldo so eisini leggja United á odda, og hendan støðan helt sær til hálvleiks, hóast kjansir kanska vóru til fleiri mál.

Wayne Rooney var aftur at síggja á liðnum hjá "The Red Devils", og hann vísti, at hann ikki hevur mist ov nógv av seinasta skaða sínum. Og tó, hann kundi havt skorað, men kanska var væntandi bóltførleikin eftir skaðan, ið var orsøk til hetta.

Stutt undan teimum 60 minuttunum á klokkuni kundi Cristiano Ronaldo leggja United á odda 2-0 við einum stútara, og avgjørdi í veruleikanum dystin, hvat málum viðvíkur.

Fulham liðið hevu havt tað sera trupult, og fleiri av teirra stuðulsleikarum eru uttanfyri við skaða, og sjálvt um teir høvdu verið við í dag, er als ikki víst at teir kundu gera United nakað.

Men lítið man vera at ivast í at Fulham venjarin, Lawrie Sanchez, gjarna hevði viljað havt fleiri stuðulsleikarar afturat í hópinum á Old Trafford í kvøld.

Ymisk hagtøl frá NJM 2007 í Havn:

# Føroyska luttøkan

| Kapping | Luttakar | Støða | Grein |
|---|---|---|---|
| 1 | Bjørg Seloy | 10 | 50 m rygg |
| 2 | Kári J. á Høvdanum | 2 | 50 m rygg |
| 4 | Pál Joensen | 1 | 1.500 m frí |
| 5 | Guðrun H. Jakobsen | 6 | 100 m frí |
| 5 | Helena G. Jacobsen | 9 | 100 m frí |
| 6 | Pauli Ø. Mohr | 7 | 100 m frí |
| | Dánjal Hestoy | 9 | 100 m frí |
| 11 | Bjørg Seloy | 7 | 4x100 m Medley |
| | Katarina Lamhauge | | |
| | Hildur á Fløtti | | |
| | Guðrun H. Jakobsen | | |
| 13 | Katarina Lamhauge | 9 | 50 m bringu |
| 14 | David Simonsen | 5 | 50 m bringu |
| 17 | Dagmar M. Winther | 8 | 200 m frí |
| 18 | Pál Joensen | 1 | 200 m frí |
| 19 | Bjørg Seloy | 8 | 100 m rygg |
| 20 | Kári J. á Høvdanum | 3 | 100 m rygg |
| 21 | Guðrun H. Jakobsen | 7 | 50 m frí |
| 22 | Pauli Ø. Mohr | 5 | 50 m frí |
| | Dánjal Hestoy | 9 | 50 m frí |
| 23 | Hildur á Fløtti | 6 | 100 m firvald |
| 25 | Guðrun H. Jakobsen | 7 | 4x100 m frí |
| | Hildur á Fløtti | | |
| | Dagmar M. Winther | | |
| | Bjørg Seloy | | |
| 27 | Hildur á Fløtti | 8 | 50 m firvald |
| | Guðrun H. Jakobsen | 9 | |
| 29 | Dagmar M. Winther | 9 | 400 m frí |
| 30 | Pál Joensen | 1 | 400 m frí |
| 32 | Kári J. á Høvdanum | 7 | 200 m rygg |
| 33 | Katarina Lamhauge | 8 | 100 m bringu |
| 34 | David Simonsen | 5 | 100 m bringu |

Samlaða heiðursmerkjabýtið til NJM 2007 í Havn:

| Country | Gold | Silver | Bronze |
|---|---|---|---|
| SWE | 22 | 15 | 10 |
| DEN | 8 | 8 | 13 |
| FIN | 4 | 9 | 6 |
| FAR | 3 | 1 | 1 |
| NOR | 1 | 2 | 4 |
| EST | | 2 | 3 |
| ISL | | 1 | 1 |
| Grand Total | 38 | 38 | 38 |

# Top 20úrslitini á FINA stigatalvuni í NJM-kappingini vórðu:

| Swimmer | Country | Event | Time | FINA points |
|---|---|---|---|---|
| Pál Joensen | FAR | 1500 freestyle | 15.24,50 | 840 |
| Pál Joensen | FAR | 400 freestyle | 03.54,64 | 815 |
| Pernille Larsen | DEN | 100 backstroke | 01.02,45 | 813 |
| Katrine Holm Sørensen | DEN | 400 medley | 04.50,93 | 811 |
| Denmark (men) | DEN | 4×200 freestyle | 07.36,10 | 800 |
| Sweden (men) | SWE | 4×200 freestyle | 07.36,11 | 800 |
| Emma Svensson | SWE | 50 freestyle | 00.26,08 | 798 |
| Anton Lagerqvist | SWE | 200 breaststroke | 02.16,55 | 790 |
| Pál Joensen | FAR | 200 freestyle | 01.51,92 | 786 |
| Marlene Niemi | FIN | 50 freestyle | 00.26,26 | 798 |
| Sweden (men) | SWE | 4×100 freestyle | 03.26,68 | 787 |
| Lovisa Ericsson | SWE | 50 backstroke | 00.29,51 | 787 |
| Rebecka Ekelund | SWE | 400 freestyle | 04.21,36 | 787 |
| Pernille Larsen | DEN | 200 backstroke | 02.15,26 | 787 |
| Sweden (women) | SWE | 4×100 freestyle | 03.54,67 | 784 |
| Elin Slaatmo | NOR | 400 freestyle | 04.21,39 | 786 |
| Sweden (women) | SWE | 4×100 medley | 04.17,97 | 783 |
| Sweden (women) | SWE | 4×200 freestyle | 08.31,41 | 782 |
| Rebecka Ekelund | SWE | 200 freestyle | 02.04,95 | 780 |
| Severi Allonen | FIN | 200 freestyle | 01.51,92 | 780 |

rin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosi

-har tað hendir